## Betur enn væntað hjá MT Højgaard

Byggifyritøkan MT Højgaard hevði 358 milliónir krónur í avlopi í 2008, og tað var heldur meiri, enn fyritøkan hevði væntað. Umsetningurin í fjør var 11,2 milliardir krónur ella umleið fimm prosent minni enn í 2007. Í ár væntar fyritøkan, at umsetningurin verður 10 milliardir krónur, og at avlopið verður minni enn í fjør. MT Højgaard hevur í løtuni bíløgd arbeiði fyri tilsamans 9,5 milliardir krónur, og væntandi verða arbeiði fyri 6,5 milliardir krónur liðug í ár. Í meðal arbeiddu 5.300 fólk hjá felagnum í fjør ímóti 6.000 árið fyri.

## Nógv olja ígjøgnum norskan sjógv

Russiski oljuútflutningurin fer at veksa nógv í komandi árum, og tað fer millum annað at hava við sær, at russiski oljuflutningurin fram við norðurnorsku strondini verður ikki minni enn áttafaldaður tey næstu fimm árini, sigur NRK. Í fjør vórðu 9,5 milliónir tons av russiskari olju flutt fram við norsku strondini, og nøgdin verður kanska 15 milliónir tons í ár. Russar eru í ferð við stórar útbyggingar á oljuøkinum norðanfyri, og norskir serfrøðingar siga, at í 2015 skulu helst umleið 100 milliónir tons av russiskari olju flytast við tangaskipum fram við norðurnorsku strodnini.

# Tjóðveldi framløgu um fiskivinnumál á Fiskivinnuskúlanum



**Mánamorgunin vóru formaður og næstformaður Tjóðveldisins, Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen, á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna og greiddu næmingum frá um lógina um vinnuligan fiskiskap. Næmingar og lærarar lurtaðu við stórum áhuga, og nøkur nýttu høvi at seta politikarunum spurningar**

FRAMLØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein partur av framløguni snúði seg um bakgrundina aftanfyri verandi lóg, meðan høvuðsdentur varð lagdur á tær broytingar, sum flokkurin hevur skotið upp við eitt nú at skipa eina tilfeingisbúð, har fiskidagar við tíðini verða bodnir út av tí almenna – og ikki av tí privata, soleiðis sum støðan er í dag.

Ætlandi skuldi Magni Laksáfoss, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, eisini taka lut í tiltakinum í Vestmanna, men honum barst frá, tí hann skuldi til Svøríkis.

### Ein søga

Tað var Tórbjørn Jacobsen, sum legði fyri í Vestmanna og sum oftast, tá hann hevur eina framløgu, veit hann okkurt forvitnisligt at siga.

– Eg havi sitið á løgtingi síðan 1998 og fyri ta tíð sigldi eg. Hetta er aðru ferð í lívinum, at eg havi fingið høvi at halda ein fyrilestur í einum veruligum auditorium, sum hann tók til.

Løgtingsmaðurin vísti á, at fyrstu ferð, hann hevði hetta høvi, var á Lærda Háskúlanum í Århuus, og tá snúði evnið seg um gransking.

– Eg var júst byrjaður sum landsstýrismaður í mentamálum og helt, at man til slík høvi fekk ein fyrilestur útleveraðan at halda. Mín fyrilestur skuldi koma fyri seinnapartin dagin eftir. Men tá eg las fyrilesturin, eg hevði fingið at halda, helt eg ikki, at hesin kundi brúkast. Eg helt, at hann var ov ússaligur og skræddi hann sundur. Út á náttina setti eg meg at skriva mín egna. Tá eg skuldi halda fyrilesturin út á seinnapartin dagin eftir, vóru flestu teirra, sum sótu í hesum auditorium, sovnaðir, sum Tórbjørn tók til.

Hann legði aftrat, at tá hann byrjaði at røða við síni reystu rødd um eitt nú teir, sum arbeiða á bryggjuni í Århuus, og hvat ætlanin var at gera innan fiskivinnugransking í Føroyum, byrjaðu fundarluttakararnir aftur at ressast.

– Hesin fyrilesturin førdi til, at eg bleiv biðin at halda aðrar fyrilestrar ymsastaðni í Evropu, legði Tórbjørn Jacobsen aftrat.

### Fiskivinnusøga

Áðrenn Høgni Hoydal kom fram at mikrofonini og byrjaði sína framløgu, sum serliga snúði seg um tilfeingisbúðina, ið Tjóðveldi skjýtir upp, greiddi næstformaður floksins frá broytingunum í føroyskari fiskiveiði – frá tí, at føroyski fiskiskipaflotin royndi á fjarleiðum, til fiskimørkini vórðu flutt út á 12 fjórðingar í sekstiárunum og at enda út á 200 fjórðingar í 1977.

– Ísland var millum fyrstu lond, sum soleiðis vildi tryggja sær sín matkova – ella spísikamar, sum løgtingsmaðurin tók til.

Hann segði, at hesar broytingar settu stór krøv til okkara myndugleikar um, hvussu okkara fiskiveiða nú skuldi skipast.

– Fiskiflotin var gearaður til at fiska á heilt øðrum leiðum enn innanfyri okkara 200 fjórðinga fiskimark. Úrslitið gjørdist, at meginparturin av okkara fiskiflota nú kom í føroyskan sjógv at royna.

Tórbjørn segði, at valið hjá føroyskum myndugleikum nú stóð ímillum at gera neyðugar strukturbroytingar – ella at gjalda seg burtur úr trupulleikunum við studningum, tí okkara fiskigrunnar kundu ikki bera alla ta veiðiorku, sum nú virkaði innan okkara fiskimark.

### Skeivu knøttarnir

Næstformaður Tjóðveldisins segði, at við Ráfiskagrunninum vórðu stuðulsskipanir settar í verk eftir ringasta vaðskítinum, sum hann tók til.

– Nú fór at fossa út í báðum borðum – bæði úr fiskastovnum og úr einum meira og meira sperdum landskassa, samstundis sum fiskiflotin ikki varð tillagaður broyttu umstøðurnar.

Tað, at føroyingar trýstu á skeivu knøttarnar seinast í sjeytiárunum, metti Tórbjørn Jacobsen sum høvuðsorsøkina til, at Føroyar eftir tíðina við Ráfiskagrunninum vóru fyri stórum skrædli og seinni vórðu settar undir fremmanda umsiting.

– Eftir húsagangir og stóra burturflyting av føroyingum, trýstu danir eina kvotaskipan eftir íslendskum mynstri niðuryvir føroyingar. Hendan fall ikki í góða jørð í Føroyum, og ein orsøkin var, at okkara fiskiveiða er meira blandað enn eitt nú hin íslendska.



*Framløgan á Fiskivinnuskúlanum í Vestmenna eydnaðist væl, og líkt var til, at bæði næmingar og lærarar fingu væl burtur úr*
*Mynd: Jens Kr. Vang*